# ítróttur

Nr. 30 • leygardagur • 12. februar 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# B36 og HB hittast í síðsta umfarinum

**KÍ ætlast í fyrsta umfarinum at skula fáa vitjan av HB, meðan tað er lagt upp til stríð um Havnina, tá ið B36 í 27. og síðsta umfarinum skal eiga heimavøll ímóti grannunum, sum trý tey seinastu árini hava verið meistarar, meðan B36 tvey tey seinastu árini hevur vunnið silvurkrónurnar**



*Tað líkist einum braki, tá B36 og HB í 27. og seinasta umfarinum av landskappingini hittast í Gundadali*

FÓTBÓLTSSKRÁIN

*Jóannes Hansen*

Einki punkt í skránni á FSF aðalfundinum, sum verður hildin í dag, snýr seg um landskappingina í fremstu deildini og tær broytingar, sum ætlast at verða framdar. Tá verður sæð burtur frá uppskotinum um at strika upp- og niðurflytingardystirnar, sum Fótbóltssambandið vil hava feløgini at taka undir við í dag.

FSF og kappingarnevndin hava gjørt av, at landskappingin í bestu deildini í ár skal økjast við 50 prosentum. Í staðin fyri átjan skulu í fremstu deildini spælast 27 umfør. Onkrar røddir hava undrast og spurt, hví hetta hevur havt sovornan skund, tí tað hevur ikki verið mett, at málið hevur verið liðugt viðgjørt. Tað eru FSF og kappingarnevndin ikki samd við teimum undrandi í, og uppskot til kappingarskipan fyri nýggja og víðkaðu kappingina er gjørt.

Um kappingin verður soleiðis, sum uppskotið leggur upp til, so fer B36 í 27. og síðsta umfarinum, sum er sett at vera 22. oktober, at eiga heimadyst ímóti grannunum í HB. B36 hevur tvey tey seinastu árini vunnið næstfremsta plássið, og HB hevur verið meistari tríggjar tær seinastu ferðirnar. Hinir fýra dystirnir í síðsta umfarinum ætlast at verða hesir: Skála-GÍ, VB-EB/Streymur, ÍF-TB og KÍ-NSÍ.

Fyrsta umfarið er sett at vera 28. mars, sum er 2. páskadagur. Tá er ætlanin, at tey bæði feløgini, sum í fjør fóru um tey hundrað, skulu hittast í Klaksvík. Umframt KÍ-HB eru hesar uppgerðir á skránni 28. mars: VB-ÍF, GÍ-EB/Streymur, Skála-TB og B36-NSÍ.

2. umfarið ætlast at verða spælt 3. apríl, og tá ætlast skráin at síggja soleiðis út: KÍ-VB, HB-NSÍ, TB-B36, EB/Streymur-Skála og ÍF-GÍ.

Síðsta umfarið undan summarsteðginum, sum verður tað 17., ætlast at verða spælt 17. juli, og fyrsta umfarið eftir summarsteðgin er á skránni 7. august.

Ætlanin er, at fyrsta umfarið í 2. deild skal spælast 30. apríl. Tá sær skráin soleiðis út: B36-B68, Royn-FSV, AB-B71, LÍF-Sumba og GÍ-HB. Átjanda og síðsta umfarið í næstbestu deildini er ásett at vera 22. oktober. Tá sær skráin soleiðis út: B36-FSV, Royn-B71, AB-Sumba, LÍF-HB og B68-GÍ.

### Møguleiki er at viðgera málið

Hóast spurningurin um landskappingina ikki er á aðalfundar skránni, so er møguleiki fyri, at málið kann verða viðgjørt á aðalfundinum, um tað eru nóg nógv feløg, sum ynskja tað. Sambært grein sjey í lógunum fyri Fótbóltssamband Føroya, sum tað eitur í skipanini, so ber hetta til. Har verður sagt, at uppskot um mál at seta á skránna skulu vera FSF í hendi í seinast lagi 14 dagar fyri aðalfundin. Men so verður lagt afturat eitt sindur seinni í somu grein, at mál, ið ikki standa á skránni, kunnu verða tikin til viðgerðar og avgjørd, um tveir triðingar av umboðsfólkunum játta tí.

Í FSF hevur fatanin verið, at tað er rætturin og ábyrgdin hjá nevndini at leggja kappingarnar til rættis, og at hetta ikki er ein spurningur, sum eigur at verða viðgjørdur á aðalfundinum. FSF heldur seg á fundinum við feløgini í heyst at hava fingið uppbakking til at broyta kappingina. Orðaskiftið í vetur hevur bent á, at hesum eru ikki øll feløgini samd við leiðsluni í FSF í, og so fæst at síggja á aðalfundinum í dag, hvussu hetta fer at laga seg.

# Eingin bjóðar av

**Eingi mótvalevni eru, og tí er tað undan fundinum greitt, at næstformaðurin og tveir nevndarlimir verða afturvaldir á FSF aðalfundinum í dag**

FSF AÐALFUNDUR

*Jóannes Hansen*

Talan verður um friðarval, tá ið punkt fýra verður á skránni á aðalfundinum hjá Fótbóltssambandinum. Ársaðalfundurin verður í FSF húsinum klokkan tíggju fyrrapartin í dag. Fleiri av málunum, sum snúgva seg um broytingar í kappingarreglunum fyri fótbólt, og sum FSF hevur lagt fyri aðalfundin, hava verið umrødd her á síðunum fyrr í hesi vikuni.

Seinastu árini hevur ikki sørt av turbolensi verið, tá ið nevndarval hava verið fyri. Soleiðis verður tað ikki í dag. Sambært skránni fyri aðalfundin, sum FSF 4. februar sendi feløgunum, so verður sagt, at eingi uppskot eru komin til FSF uttan at endurvelja nevndarlimirnar, sum allir taka við afturvali.

Talan er um næstformannin, Niklas á Líðarenda, sum hevur sitið í sessinum tvey tey seinastu árini, og nevndarlimirnar Jens Erik Magnussen og Karl Vidtfeldt. Jens Erik Magnussen hevur verið í FSF nevndini nógv tey flestu av teimum 26 árunum, sum sambandið hevur verið til, og Karl Vidtfeldt hevur eisini mong ár á baki í FSF.

Áður valdaði altíð spenningur um nevndarvalið, inntil tað var avgreitt. Tað bar fundarluttakarunum til at leggja uppskot um nevndarlimir fyri sjálvan fundin, uttan at tað var neyðugt at boða frá hesum frammanundan. Soleiðis er tað ikki longur. Uppskot skulu sendast FSF innan ásetta tíð. Men tað hevur eingin gjørt hesa ferð, og tískil fer FSF nevndin at hava somu manning eftir aðalfundin, sum hon hevur havt undan aðalfundinum.